# Fløskurnar í bás á ólavsøku

**Á ólavsøku kemur Tórshavnar kommuna at hava ein fløskubás í miðbýnum í Havn fyri at umgangast tey nógvu fløskubrotini. Yvirskotið av fløskuinnsavningini fer til vælgerandi endamál**

FLØSKUBÁSUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Umboðini fyri býráðið, Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini, greiddu frá um nýggja tiltakið hjá kommuni. Fyri at vísa á høgu raðfestingina av umhvørvismálum í kommununi eru grønar keks, grønar sodavatn og grøn súrepli á borðinum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Undir slagorðinum »Fløskur í kassan og pengar í lumman« var tíðindafundur í Høll E hjá Balslev í Hoyvík, har nýggi fløskubásurin hjá Tórshavnar kommunu varð sýndur fram mánadagin. Básurin kemur annars at standa í Steinatúni, oman á kioskini.

Tórshavnar kommuna eigur básin, sum verður karmur um fløskumóttøku á ólavsøku. Básurin er sera snøggur og væl úr hondum greiddur.

Umboðini fyri býráðið, Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini, greiddu frá um nýggja tiltakið hjá kommuni, ið serliga verður gjørt fyri at umgangast tey nógvu fløskubrotini á ólavsøku, sum eru sera vandamikil. Fløskuinnsavningin verður eisini gjørd fyri at kunna um høgu raðfestingina av umhvørvismálum í kommununi.

Hetta er so avgjørt ein fyrimunur hjá teimum, sum savna fløskur á ólavsøku, tí nú kunnu tey sleppa av við fløskurnar í miðbýnum ístaðin fyri at skula bera tær heim í beriposum og síðan selja tær. Eisini fáa tey pengarnar beinanvegin.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt avtalu við Kiwanis felagsskapin Rósuna um at reka básin á ólavsøku. Yvirskotið av fløskuinnsavningini fer til vælgerandi endamál – at hjálpa børnum í nærumhvørvinum, sigur Karin Jacobsen frá Rósuni.

Byrjað verður mikudagin 27. juli, tá ólavsøkukonsertin verður, og síðan báðar ólavsøkudagarnar.

Opið verður soleiðis: Mikudagin 27. juli frá kl. 20.00 – 04.00, og ólavsøkuaftan og ólavsøkudag frá kl. 14.00 – 04.00 ella so leingi fólk koma við fløskum.

# VR-Bilar og Esmar Simonsen gjørt avtalu







**Sp/f VR-Bilar og P/F Esmar Simonsen hava gjørt avtalu viðv. Chevrolet (fyrrv. Daewoo)**

**Felags tíðindaskriv**

**Bilasølan:** Avtala er gjørd millum Sp/f VR Bilar á Hoyvíksvegnum í Havn og P/F Esmar Simonsen á Kambsdali um at VR-Bilar framyvir fara at umboða bilmerkið Chevrolet í Føroyum. VR-Bilar selur frammanundan bilmerkini Volvo og Renault.

Avtalan ber eisini í sær, at P/F Esmar Simonsen fer framhaldandi at selja Chevrolet, vegna VR-Bilar. Harumframt fara fara teir eisini at selja Volvo og Renault vegna VR-Bilar.

Fyri báðar bilasølurnar merkir hetta, at útboðið verður víðkað, so at viðskiftafólkini kunnu finna sær ein bil til einhvønn tørv og prísklassa og at viðskiftafólkunum stendur í boði ein kvalitetsbil við upp til 3 ára mekaniskum garanti fyri ein sera kappingarføran prís.

**Verkstað:** Verkstaðið hjá Esmar Simonsen á Kambsdali fer framhaldandi at servisera Chevrolet. Hesi viðskiftafólkini kunnu framyvir velja, um teir ynskja at nýta verkstaðið hjá VR-Bilum í Havn, ella verkstaði hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali. Hetta verður eisini galdandi fyri Volvo og Renault viðskiftafólk. Tó verða ávísar mannagongdir gjørdar, sum viðskiftafólkini verða kunnaði um seinni.

**Eykalutir:** Goymslan av Chevrolet eykalutum verður í næstum flutt til VR-Bilar í Havn, sum kann senda eykalutir um alt landið.

»Hendan avtalan fer at betra tænastustøðið fyri verandi Daewoo og Chevrolet-eigarar, umframt at geva okkum møguleika at selja Volvo og Renault bilar í Eysturoynni« sigur Martin Simonsen, stjóri hjá P/F Esmar Simonsen.

»Hetta er ein góð avtala har allir partar vinna – VR-Bilar, Esmar Simonsen, og ikki minst kundarnir hjá okkum«, sigur Marni Olsen, stjóri hjá VR-Bilum.

Nærri og fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Marna Olsen, stjóra hjá P/F VR-Bilum, á tlf. 322110/215099, e-mail: vr-bilar@post.olivant.fo ella Martin Simonsen stjóra hjá P/F Esmar Simonsen á tel. 444405/584400.